## Agger var yngstur

Tað vóru tvey lið við nógvum royndum, sum fóru á vøllin í Athen í gjárkvøldið. Eitt er, at nærum 39 ára gamli Maldini var elsti maður. Meira sigandi er kanska, at yngsti maðurin á vøllinum var heili 22 ára gamal. Nevnliga Daniel Agger. Hjá Milan var yngsti maðurin 25 ára gamli Kaka.

## Overufegin Ancelotti

- Fáur – um nakar – hevði roknað við okkum í ár, men hetta er størsti sigurin, vit nakran tíð hava vunnið. Soleiðis segði Carlo Ancelotti, Milan-venjari, tá teir í gjárkvøldið høvdu bast Liverpool í Champions League finaluni. – Hetta var eisini ein týdningarmikil sigur fyri italskan fótbólt. Gølan í fjør setti djúp sár í so máta, men vónandi kann sigurin hjá okkum vera við til at lekja hesi sár, segði Ancelotti.



Milan-Liverpool 2-1 (1-0):

# Inzaghi basti Liverpool

**Inzaghi skoraði bæði málini, tá Milan í gjárkvøldið fekk hevnd fyri finalutapið í Istanbul í fyrraárið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Her verður finalan avgjørd. Filippo Inzaghi prikar bóltin undir Pepe Reyna, og so stendur 2-0 á stóru talvuni við Olympiska leikvøllin í Athen*

*Mynd: Polfoto/AP*

Í sínum 86. europiska dysti sendi lítli Filippo Inzaghi leðurkúluna í netið fyri ávikavist 50.og 51. ferð. Kanska var fyrra málið av hepnara slagnum, tá hann avrættaði fríspark frá Andrea Pirlo. Men fá av málinum hava vakt eins stóra gleði, sum tey bæði, ið hann fekk í Athen í gjárkvøldið.

Umframt at seinna málið var mál nummar 500 hjá Milan í europiskum høpi, so broytti hetta talvuna á leikvøllinum til 2-0, og við bara knøppum 10 minuttum eftir visti Milan tá, at steypið við stóru oyrunum nú aftur var teirra.

Talan var ikki um eina av teimum finalunum, sum verða prentaðar í tilvitskuna við minnum um dramatikk ella gott spæl. Heldur var talan um ein heldur linligan dyst, har Milan fyrstu longu løtuna hevði sera ilt við at koma í tær snúningar, sum liðið áður hevur víst.

Fyrra umfarið vóru skeivu sendingarnar nógvar, og fleiri ferðir var um reppið, at heilt stórir møguleikar til Liverpool spurdust burturúr. Tann heilt stóri og kanska avgerandi møguleikin kom tó ikki, og liðini høvdu so smátt sett seg til sættis við einum málleysum fyrra hálvleiki, tá Liverpool fekk sum vátan vøtt.

Pirlo skeyt fríspark úr góðari støðu, men Reyna tóktist hava fult tamarhald á støðuni. Inzaghi var tó runnin við fram í skotið, og tá bólturin bar við hann, var Reyna púrasta seldur.

Málið gav Milan neyðuga sjálvsálitið til seinna hálvleik, har teir fyri tað nógva vóru betra liðið. Liverpool hevði tó ein risa-møguleika, tá Gerrard stríddi seg inn um verjuna, men uttan neyðugu javnvágina gjørdist talan um eitt bleytt skot, sum Dida bjargaði.

Og so kundi Inzaghi ístaðin avgera, tá Kaka skotfintaði Liverpool-verjuna, áðrenn hann stakk inn um til púra leysan Inzaghi.

### Eingin endurtøka

Vónin hjá Liverpool um enn eitt ótrúligt come-back fekk lív seinastu minuttirnar. Kuyt stútaði bóltin í netið stutt fyri leiklok, og so hevði Liverpool ein minutt umframt teir tríggjar, sum dómarin legði afturat.

Tankarnir leitaðu kanska aftur til Istanbul, har teir reyð bert nýttu sjey minuttir til trý mál, men ein endurtøka í so máta gjørdist ongan tíð aktuell. Milan helt høvdið púrasta kalt seinastu løtuna, og so var leyst og liðugt. Sjeynda steypið í meistarakappingini var komið til høldar, og við hesum helt Milan fast um heitið sum næst mest vinnandi felag í kappingini.

### FAKTA

Um dystin

Milan-Liverpool 2-1 (1-0)
1-0: Filippo Inzaghi, 45
2-0: Filippo Inzaghi, 82.
2-1: Dirk Kuyt, 89.

| Milan | |
|---|---|
| Skot (á mál) | 7(3) |
| Fríspørk | 16 |
| Horna | 4 |
| Rangstøða | 3 |
| Tíð við bóltinum | 54% |
| Gul kort | 2 |
| Bjargingar | 3 |

| Liverpool | |
|---|---|
| Skot (á mál) | 17(4) |
| Fríspørk | 26 |
| Horna | 6 |
| Rangstøða | 3 |
| Tíð við bóltinum | 46% |
| Gul kort | 2 |
| Bjargingar | 1 |

# Maldini í søgubøkurnar

Longu tá byrjunaruppstillingin hjá Milan varð kunngjørd, stóð greitt, at Paolo Maldini við dystinum fór at skriva seg í søgubøkurnar. Hetta var nevnliga 8. ferðin, at Maldini spældi finalu í europisku meistarakappingini. Slíkt bragd er bert framt eina ferð áður – tá Gento í 1966 spældi sína áttandu finalu fyri Real Madrid.

Í mun til Gento, so hevur Maldini tó “bert” vunnið stóra steypið fimm ferðir. Tað megnaði Gento seks ferðir.

Enn hevur Maldini tó møguleika at seta metið. Hann hevur júst longt sáttmálan við AC Milan, og tí er ikki púrasta óhugsandi, at hann hevur møguleikan at spæla sína níggjundu finalu um eitt ár.

Íalt hevur Maldini spælt 153 europiskar dystir fyri Milan. Í hesum hevur hann skotið trý mál.

### Finalurnar hjá Maldini

| | |
|---|---|
| *1989* | |
| Milan-Steaua Bucharest | 4-0 |
| *1990* | |
| Milan-Benfica | 1-0 |
| *1993* | |
| Marseille-Milan | 1-0 |
| *1994* | |
| Milan-Barcelona | 4-0 |
| *1995* | |
| Ajax-Milan | 1-0 |
| *2003* | |
| Juventus-Milan | 2-3 (br.) |
| *2005* | |
| Milan-Liverppol | 5-6 (br.) |
| *2007* | |
| Milan-Liverpool | 2-1 |

*Fyri fimtu ferð kundi Paolo Maldini lyfta steypið við stóru oyrunum*
*Mynd: Polfoto/AP*

